Maraton-vinnarin:

# Eg fór eftir sigrinum

**– Eg fór eftir sigrinum, og tað eydnaðist. Eg eri eisini væl nøgdur við tíðina hjá mær, segði ein sera lúgvaður Cecil Weihe eftir maraton-renningina leygardagin**

MARATON
*Stefan í Skorini*




*Rennararnir leggja til brots á maraton teininum leygardagin. Cecil Weihe miðskeiðis á myndini við nummar 3 á bringuni vann kappingina við tíðini 2 tímar 54 minuttir og 55 sekund*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Leygardagin skipaði Bragdið fyri tí fyrstu maratonrenningini í Føroyum síðan Oyggjaleikirnar í 1989, tá toftamaðurin Absalon Hansen fór avstað við gullmerkinum.

Kappingin eydnaðist væl, og 26 menn og tríggjar kvinnur fullførdu teinin og komu aftur á málið.

Vinnarin leygardagin var 38 ára gamli skálamaðurin Cecil Weihe, og hann var sjálvsagt glaður um sigurin. Cecil nýtti tíðina 2 tímar 55 minuttir og 54 sekund uppá teinin, sum er 42,195 kilometrar.

Sigurð B. Justinssen úr Bragdinum í Havn kom á mál sum nummar tvey, og hann var umleið tíggju minuttir aftanfyri Cecil.

Sigurð og Cecil fylgdust teir fyrstu tólv kilometrarnar, men so valdi Sigurð at seta ferðina eitt vet niður, og hetta hevði við sær, at Cecil rann einsamallur ein stóran part av teininum.

### Leggur ferðina beinanvegin

Cecil greiðir frá, at ein maraton rennari skal leggja ferðina frá byrjan.

– Tú leggur ferðina beinanvegin. Ein maraton rennari rennur at kalla í somu ferð frá byrjan til enda, greiðir Cecil frá.

Tí er tað sera umráðandi ikki at leggja ov hart út. Gert tú tað, verður tú revsaður móti endanum av teininum, tá beinini heilt einfalt ikki orka at bera teg meira.

– Tú skalt ikki kenna nakra møði eftir 20 kilometrar. Eftir 30 kilometrar fer møðin so spakuliga at merkjast í beinunum, sigur Cecil Weihe, sum tríggjar ferðir áður hevur luttikið í maraton kappingum. Tvær ferðir í Keypmannahavn og einaferð í Odense.

Besta tíðin hjá honum er 2 tímar og 49 minuttir. Hetta var á einum nógv sléttari strekki enn hesuferð, og tí er hann nøgdur við tíðina sum heild.

– Hetta er óivað tað besta maratonið, eg nakrantíð havi runnið, leggur Cecil afturat.

### Fleiri brekkur

Vanligt er at renna maraton á einum so sløttum strekki sum gjørligt, men á hesum teininum vóru fleiri brekkur, sum gjørdu tað nærum ógjørligt hjá rennarunum at halda somu ferðina allan vegin.

Tá rennararnir nærkast Havnini, skulu teir vinna upp tríggjar brekkur, og hetta var sera hart.

Tann fyrsta brekkan var við el-verkið inni á Sundi, tann næsta var beint eftir Sandvíkahjalla og tann triðja brekkan var niðan frá Hvítanesi. Slíkar brekkur eru sera krevjandi, og tað tók hart uppá fleiri av rennarunum. Torført er tó at finna eina heilt slætta rutu í Føroyum.

– Tá eg havi runnið maraton í Danmark hevur tað sum oftast verið sól, og tí er lætt at blíva dehydreraður. Her í Føroyum hevur tú tó brekkurnar at berjast ímóti, sigur Cecil.

Undan eini slíkari kapping er tað umráðandi at eta rættan kost og at drekka nógv vatn.

– Hesar síðstu tríggjar dagarnar havi eg drukkið 2-3 koppar av vatni um tímar fyri at fylla kroppin við vætu. Teir seinastu fimm dagarnar havi eg etið kost við nógvum kolhydrati, so sum breyð, rís og pasta, greiðir Cecil frá.

### Fá ung

Eitt merkisvert við kappingini leygardagin var, at sera fáir ungir rennarar vóru við. Yngsti rennarin var 23 ára gamal, og tað vóru rennarar um 40 ára aldur, sum gjørdu seg galdandi.

– Tað er kanska ikki nóg attraktivt hjá ungum fólki at íðka renning. Nú er Bragdið tó farið undir kappingar fyri tey yngru, so møguliga gerst undirtøkan størri, sigur Cecil.

Hann fýlist tó á umstøðurnar hjá renning og frælsum ítrótti sum heild í Føroyum.

– Tað eru fleiri evnaríkir ungir føroyingar, sum ikki hava møguleika at menna síni evnir innan frælsan ítrótt, og tað er spell.

Umframt maraton kappingina var eisini skipað fyri kapping í hálvmaraton og á 5 kilometra teininum.

# Av Mallorka at renna maraton

**37 ára gamli spaniólin Jorge Matauco var komin ta longu leið av Mallorka til Føroyar at renna maraton. Honum dámar best at renna í smáum kappingum í fjarskotnum støðum, og hann hevur latið tvær bøkur um ferðir sínar úr hondum**

MARATON
*Stefan í Skorini*

– Hetta var eitt sera hart maraton. Tað vóru fleiri brekkur móti endanum, og tær vóru tungar, sigur Jorge Matauco, sum var við í maraton renningini leygardagin.

Hann rann teinin við tíðini 4 tímar og 44 sekund. Hann er væl nøgdur við hesa tíðina, tá hugsað verður um brekkurnar og veðrið.

Jorge hevur seinastu árini ferðast í Norðurevropa og luttikið í fleiri maraton kappingum. Hann er úr Baskalandinum í Norðurspania, men hann býr á Mallorka.

– Mær dámar væl at renna maraton í serstøkum støðum, sum onnur ikki fara til, sigur einasti spaniólin í kappingini leygardagin.

Hann hevur runnið maraton í m.a. Kangerlussuaq í Grønlandi, Íslandi, Álandi og á Isle of Man. Hansara frítíðarítriv er at skriva, og hann hevur givið tvær bøkur út. Tær snúgva seg um ferðir hansara kring heimin, og hann fer møguliga at skriva eina bók um ferðir sínar til Føroyar.

### Lítil ferðavinna

Jorge Matauco var í Føroyum fyri tveimum árum síðani, og honum dámdi væl. Tí valdi hann at leggja leiðina aftur hendavegin til hesa maraton renningina. Steðgurin hesuferð var stuttur, tí longu sunnudagin fór hann av landinum aftur.

– Føroyar er eitt tað besta staðið at renna maraton. Mær dámar væl landslagið, tær lítlu bygdirnar og tey høgu fjøllini, leggur hann afturat.

Jorge hevur ongantíð runnið í teimum stóru maraton kappingunum í New York, London og Berlin, tí tað eru ov nógv luttakarar, og tað er ikki serliga spennandi at renna inni í einum stórbýi.

– Mær dámar væl í Føroyum, tí ferðavinnan enn ikki hevur fingið fastatøkur á hesum landinum, sigur Jorge, sum sjálvur býr á Mallorka, sum er kend fyri tað stóra talið av ferðafólkið, ið hvørt ár vitjar oynna.



*Jorge Matauco var komin ta longu leið av Mallorka at luttaka í Tórshavn Marathon. Honum dámar væl at fara til fjarskotin støð at renna maraton*
*Mynd: Photo Care*

## Fakta

Maraton renningin var upprunaliga ein kapping til heiðurs um søgnina um Pheidippides, sum rann úr býnum Marathon til Athen við tíðindunum um sigur grikka í bardaganum um Marathon í árinum 490 fyri Krist.

Tá Pheidippides kom til Athen við boðunum um sigurin, var hannn so útlúgvaður, at hann small deyður um.



Heidi fekk 5 gull:

# Hørð venjing givið úrslit

**– Eg hevði als ikki væntað at fáa so nógv gullmerkir í hesi kappingini, sigur Heidi Andreasen, nú hon er afturkomin úr Kanada við fimm gullmerkjum um hálsin.**

SVIMJING
*Stefan í Skorini*

Týsmorgunin komu Heidi Andreasen og venjari hennara, sviin Mats Brisenfeldt, aftur til Føroyar.

Heidi hevur luttikið í »Canadian Open for Swimmers with a Disability«. Kappingarnar vóru frá hósdegnum til sunnudag. Heidi luttók í fimm greinum, og hon gjørdi ikki mætari enn at vinna tær allar.

Harumframt setti hon trý heimsmet. Tvær ferðir breyt hon metið í 200 metra frí og einaferð í 50 metur firvaldasvimjing. Hon luttók í kappingunum 50, 100, 200 og 400 metur frí í dag og 100 metur firvaldasvimjing.

### Hørð venjing

– Eg havi vant sera hart seinastu tíðina, og tað hevur givið úrslit. Eg hevði als ikki væntað at klára meg so væl, og tað kom tí sum eitt yvirraskilsi, sigur ein fegin Heidi Andreasen í telefonini á veg norðaftur til Eiðis.

Umframt heimsmetini vóru tíðirnar hjá Heidi ofta niður ímóti hennara persónligu metum.

– Mín harðasti kappingarneyti var ikki við hesuferð, og tað kann hava verið til, at tað gekk so væl. Men eg tók hennara heimsmet á 200 metra teininum, sigur Heidi.

Kappingarneytin, hon sipar til, er Karen Liebovitch úr Ísrael, sum átti gamla metið í 200 frí.

### Hevur framvegis skaða

Heidi Andreasen sigur, at tað er sera hart at luttaka í fimm kappingum innanfyri fýra dagar.

– Tað var ræðuliga strævið. Eitt er at vera móður kropsliga, men tað er eisini strævið sálarliga. Tú skalt allatíðina hugsa positivt og hava tann rætta innstillingin, meðan kappingin er, og tað var strævið, sigur Heidi.

Við á ferðini hesuferð var sviin Mats Brisenfeldt. Hann hevur saman við Katrin Johansen tikið sær av venjingini hjá Heidi seinastu tíðina, og tað hevur gingið væl.

Tey hava lagt eina langtíðarætlan við venjingini hjá Heidi, og tað hevur eftir øllum at døma givið úrslit.

Heidi hevur drigist við ein skaða í longri tíð, og skaðin lúrir framvegis.

– Eg má framvegis ansa eftir skaðanum. Eg má ikki venja ov hart, so at skaðin kemur aftur, sigur Heidi Andreasen at enda.



*Heidi Andreasen við teimum fimm gullmerkjunum, sum hon fekk í kappingini í Kanada*
*Mynd: Jákup Persson*

## Fótbóltsskúli á Tvøroyri

Aftur í ár skipar TB fyri fótbóltsskúla fyri tey ungu í felagnum. Hetta er annað árið á rað, at TB tekur stig til ein fótbóltsskúla fyri limirnar í felagnum. Umleið 110 børn hava boðað frá luttøku til fótbóltsskúlan í ár, og tað er fult teknað.

Byrjað verður nú mikumorgunin klokkan 9 á vøllinum á Sevmýri. Fótbóltsskúlin er fyriskipaður á Sevmýri, og fyri geva børnunum so góðar karmar sum gjørligt, verður vøllurin í Hvalba eisini nýttur.

Eins og í fjør er tað danin og fyrrverandi TB-venjarin, Svend Petersen, sum er leiðari á skúlanum. Úr TB siga tey, seg fegnast um stóru undirtøkuna, og heita á øll at møta stundisliga klokkan níggju mikumorgunin.

-páll

# Maraton-tíðir

### Maraton – Menn

| Pláss | Nr | Fornavn | Eftirnavn | Føddur | Bústaður/Felag | t. | m. | s. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 3 | Cecil | Weihe | 1965 | Bragdið | 2 | 55 | 54 |
| 2 | 11 | Sigurð B. | Justinussen | 1967 | Bragdið | 3 | 5 | 42 |
| 3 | 16 | Hjalti | Gunnarstein | 1961 | Bragdið | 3 | 9 | 51 |
| 4 | 20 | Jósvein Herup | Olsen | 1958 | Bragdið | 3 | 12 | 45 |
| 5 | 27 | Preben | Hansen | 1953 | Danmark | 3 | 28 | 9 |
| 6 | 22 | Gustav | Struck | 1950 | Danmark | 3 | 36 | 16 |
| 7 | 15 | Heini Trond | Hansen | 1958 | Danmark | 3 | 37 | 14 |
| 8 | 1005 | Brian | Bernhardson | 1667 | Miðvágur | 3 | 37 | 18 |
| 9 | 26 | Ólavur Herup | Olsen | 1943 | Bragdið | 3 | 46 | 6 |
| 10 | 4 | Djóni | Ziska | 1965 | Bragdið | 3 | 48 | 10 |
| 11 | 14 | Hanus | Højgaard | 1960 | Bragdið | 3 | 50 | 23 |
| 12 | 25 | Martin V. | Heinesen | 1953 | Toftir | 3 | 51 | 30 |
| 13 | 6 | Jens Hjørleif | Hansen | 1968 | Tórshavn | 3 | 52 | 39 |
| 14 | 5 | Hjalti | Lamhauge | 1980 | Hoyvík | 3 | 54 | 44 |
| 15 | 8 | Jorge | Matauco | 1966 | Mallorca | 4 | 0 | 44 |
| 16 | 2 | Allan | Dalsgarð | 1972 | Danmark | 4 | 3 | 14 |
| 17 | 1 | Robert | Vilhelmsen | 1951 | Bragdið | 4 | 4 | 45 |
| 18 | 19 | Jógvan Edvard | Joensen | 1963 | Bragdið | 4 | 10 | 3 |
| 19 | 18 | Janus | Petersen | 1959 | Bragdið | 4 | 10 | 17 |
| 20 | 7 | Johan Pauli | Johansen | 1972 | Bragdið | 4 | 10 | 55 |
| 21 | 13 | Birgir | Sondum | 1962 | Bragdið | 4 | 13 | 8 |
| 22 | 24 | Holger | Arnbjerg | 1951 | Bragdið | 4 | 14 | 34 |
| 23 | 17 | Jákup-Alberg | Berg | 1963 | Bragdið | 4 | 15 | 53 |
| 24 | 9 | Ragnar | Helmsdal | 1978 | Hoyvík | 4 | 19 | 56 |
| 25 | 10 | Samson | Nesá | 1972 | Norðragøta | 4 | 23 | 57 |
| 26 | 12 | Bent Tommy | Linklett | 1963 | Bragdið | 4 | 44 | 38 |

### Maraton – Kvinnur

| Pláss | Nr | Fornavn | Eftirnavn | Fødd | Bústaður/Felag | t. | m. | s. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 29 | Janet Skarðsá | Jacobsen | 1976 | Fuglafjørður | 4 | 5 | 22 |
| 2 | 31 | Majbritt | Vestergaard | 1957 | Roysnið | 4 | 21 | 7 |
| 3 | 30 | Agnes | Hansen | 1954 | Ísland | 4 | 33 | 51 |



*Børnini sluppu eisini uppí part leygardagin. Tey runnu tó ikki maraton hesuferð*
*Mynd: Álvur Haraldsen*